# eldru



*- Tit hava eitt ótrúliga vakurt land, siga hjúnini Gunnar og Birgitta Hansson úr Svøríki*

kunnu læra av hvørjum øðrum.

– Vit hava eisini sæð her, at tit eru komin rættiliga langt á ávísum økjum, m.a. við møguleikunum hjá teimum eldru at hittast.

– Hetta sóu vit m.a. í Tilhaldinum í Havn. Tað var ein stór uppliving, og tað var ótrúligt, so nógv spennandi tey høvdu á skránni hvørja einastu viku, siga tey bæði.

Í Luleå verður gjørt eitt stórt arbeiði fyri at undirvísa teimum eldru. Her finst m.a. ein serstakur skúli í hesum sambandi, har nógv av teimum eldru fáa sær nýggja vitan og nýggjan kunnleika.

Ein mun sóu tey kortini í eldraøkinum: Her á landi taka børnini sær væl av foreldrum sínum, tá tey gerast eldri.

Í Svøríki er støðan ikki tann sama, og tí verða tey eldru ofta noydd at fara á eldraheim, ofta kanska fyrri enn neyðugt.

Hinvegin so er heimarøktin rættiliga væl útbygd allastaðni, men tað eru kortini nøkur støð, har hon ikki er eins væl útbygd.

– Í Luleå eru vit kortini so heppin, at heimarøktin væl útbygd, siga tey bæði.

### Á somu støð

Í dag er Gunnar 71 ára gamal og Birgitta 68 ár. Aftanfyri seg hava tey eitt virkið lív á arbeiðsmarknaðinum.

Gunnar arbeiddi innan svenska flogvápnið sum tyrlumekanikkari, meðan Birgitta arbeiddi í síni sum lærari hjá børnum undir skúlaaldur.

Í samband við vitjanina her varð skipað so fyri, at tey hava eisini havt stundir at vitja í sambýlinum í Vestmanna og í barnagarðinum.

– Nei, eg havi ikki enn havt møguleika fyri at vitja teir, ið arbeiða við tyrlum á flogvøllinum í Vágum. Eg veit heldur ikki, um tíð verður til tað, sigur Gunnar.

Prátið er liðugt, og nú skal fundurin við umboðini fyri Pensiónistafeløgini byrja. Hetta er eisini ein partur av skránni hjá svensku gestunum.

Her er nógv at tosa um hjá teimum, tí gongdin í heiminum er hon, at tey eldru gerast frískari, ríkari, tey liva longri og seta størri og størri krøv.

– Hóast tit eru eitt lítið land og vit koma frá einum stórum landi, so hava vit nógv felagsmál at tosa um.

– Vit gleða okkum at møta føroysku umboðunum, siga Birgitta og Gunnar.



*Tey hava nógv at tosa um – tey fýra: vm. Gunnar og Birgitta Hansson, og Maria og Jákup Hansen*

# Til Svøríkis í summar

Tá hjúnini Hansson fingu at vita at tey skuldu til Føroyar, svaraðu tey sum vera man játtandi uppá tað.

Men tey vistu ikki, hvat tey skuldu vera, búgva ella hvat var á skránni undir vitjanini. Tey fingu bara at vita, at tey skuldu búgva hjá einum pari í Vestmanna

Í sambandi við verkætlanini hevði Kommunufelagið heitt á hjúnini Jákup og Mariu Hansen í Vestmanna um at taka ímóti hesum svensku hjúnunum í eina viku. Hesum játtaðu tey.

Og mikudagin í farnu viku var so fyrsta ferðin, at Birgitta og Gunnar settu fót sín á føroyska jørð. Og fyrstu ferð at Jákup og Maria hittu svensku gestir sínar.

Hetta verður kortini ikki seinasta ferðin at tey hittast. Sambært verkætlanini so skulu hjúnini úr Vestmanna til Svøríkis at vitja Birgitta og Gunnar seinni í ár.

Heima í Luleå hava tey nógv, sum tey fegin vilja vísa fram fyri føroysku hjúnunum. Bæði eru tey virkin í ymiskum lestrarringum og teimum dáma eisini sera væl at bowla. Annars er náttúran sera vøkur kring heimbýin, so har er nokk at vísa fram.

Enn er ikki endaliga avgjørt, nær hetta verður, men helst verður tað til tað, at hetta verður í summar.

– Vit vilja so fegin takka teimum fyri gestablíðskapin. Og tí kundu vit hugsað okkum at tey komu til okkum í summar, tá vit fara at hava okkara miðsummarhald, siga tey bæði brosandi svensku hjúnini.

Tey komu higar mikudagin og fara aftur til Svøríkis í morgin.

## FAKTA

### "Okkara lív sum eldri"

- Føroya Kommunufelag luttekur í eini trý ára millumtjóða verkætlan við hesum heiti.
- Verðkætlanin verður stuðlað av grunninum Northern Periphery Program, sum aftur verður fíggjaður av ES og av londunum, sum eru fevnd av grunninum.
- Verkætlanin byrjaði við luttøku av Føroya Kommunufelag, Bodø kommune í Noregi og Luleå kommune í Svøríki. Síðani eru tvær kommunur í Finnlandi vorðnar partur av verkætlanini, umframt Universitetið í Aberdeem eisini luttekur.
- Endamálið er at lýsa eldraøkið í teimum ymisku londunum, og at koma við uppskotum um, hvussu eldraøkið kann skipast á besta hátt í framtíðini.



*- Umstøðurnar hjá teimum eldru eru ymiskar, men trupulleikarnir eru teir somu, siga Gunnar og Birgitta Hansson*